Skúvoyar kommuna

Løgmansskrivstovan

Samband: lms@lms.fo Skúvoy 14. november 2025

Hoyringsskriv:

Mál: Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum

Uppskotið gevur P/F Suðuroyartunnil heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út verkætlanina Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.

Viðmerkingar:

Skúvoyar kommuna vil hava hesar broytingar í lógaruppskotinum:

§3 stk. 1.

§ 3. P/F Suðuroyartunnilin fyrireikar, prosjekterar og letur í útboð hesar verkætlanir:

1) Vegur frá Sandoyartunlinum í Traðardali til vestara tunnilsmunna í Sandalíð

2) tunnil gjøgnum Sandalíð,

3) vegagerð frá eystara tunnilsmunna í Sandalíð til tunnilsmunna í Djúpadali, við íbinding í verandi vegir til Skálavíkar og Skarvanesar,

4) undirsjóvartunnil við koyribreyt suður og norður í sama bergholi frá Djúpadali til Sandvíkar, við tilknýttum atkomutunnli frá Suðuroyartunlinum til Skúvoyar,

5) vegagerð millum undirsjóvartunnilin í Sandvík og nýggja Sandvíkartunnilin,

6) tunnil úr Sandvík til Hvalbiar, og

7) vegagerð í Hvalba, frá Sandvíkartunlinum til landsvegin frá Hvalbiartunlinum.

Skal broytast til:

§ 3. stk. 1 P/F Suðuroyartunnilin fyrireikar, prosjekterar og letur í útboð hesar verkætlanir:

1) Vegur frá Sandoyartunlinum í Traðardali til norðara tunnilsmunna í Suðuroyartunlinum norðanfyri Sands bygd.

2) Undirsjóvartunnil við koyribreyt suður og norð í sama bergholi frá økinum norðanfyri Sands bygd, til Sandvíkar, við linjuføring og rundkoyring undir Skúvoy, og tunnil inn til bygdina.

3) Tunnilin frá rundkoyringini undir Skúvoy og inn til Skúvoyar bygd skal bjóðast út saman við restina av verkætlanini.

4) vegagerð millum undirsjóvartunnilin í Sandvík og nýggja Sandvíkartunnilin,

5) tunnil úr Sandvík til Hvalbiar, og

6) vegagerð í Hvalba, frá Sandvíkartunlinum til landsvegin frá Hvalbiartunlinum.

Uppskot til linjuføring er i niðast í hoyringskrivinum. Í samband við arbeiðsøki og fyribils havn í Skúvoy vísir kommunan til øki sunnanfyri Seiðagjógv og ánna norðanfyri kirkjugarðin.

Nakað av bøi undir fjósinum kann takast til arbeiðsøki. Í samband við m.a. búseting og oljugoymslu verður víst til at verandi fasilitetir í oynni verða brúktir ella bygdir út um tørvur er.

Í samband við nýtsla av gróti til havnalag skal hetta í so stóran mun sum møguligt koma frá undirsjóvartunlinum sum verður gjørdur.

Í samband við inntriv í djóralív í økinum sunnanfyri Seiðagjógv og suður til ánna norðanfyri Kirkjugarðin verður víst á at talan er um bera hellu, dyrkaðan bø og lítið og einki djóralív.

Í samband við at núverandi havn í bygdini varð bygd út í fyrru helvt av nítiárunum var grót lagt í fjøruna við Stangargjógv. Lundin vandist við hetta og seinni er nýtt fuglalív komi í gróti sum liggur við gjónna.

Øki sum kommunan vísir á er øki, sum skjóttarbeiðandi bólkurin hjá Løgmansskrivstovuni skeyt upp í summar og bólkinum sum kom við aðrari tunnilsleið, sí myndir niðanfyri.

Økini eru 60.000 og 50.000 fermetrar. Bøurin sum verður tikin skal avmarkast mest møguligt.

Kommunan tekur ikki undir við uppskotinum til arbeiðsøki/havn sum P/F Suðuroyartunnil hevur skotið upp.



Arbeiðsøki/havn sambært bólkinum hjá bólkinum hjá løgmansskriv (60.000 m2)



Arbeiðsøki/havn hjá alt. tunnilsbólkinum (50.000 m2)


Vegna Skúvoyar kommunu

Jákup Andrias Thomsen

Harry Jensen

Skúvoyar Kommuna
Skúlavegur 6
[illegible]

Linjuføring:



Linjuføring undir Skúvoynni, rundkoyring og tunnil inn til bygdina.

